# – Eg vil heldur hava skeivar tenn enn anføll

**- Tað var ikki fyrrenn eg slapp av við teir tríggjar boylarnar í munninum, at anføllini og kramparnir steðgaðu. Eg byrji nú at føla meg trygga, og vóni ikki at eg fái nakað anfall aftur, sigur Joan Finnsdóttir Danielsen, sum gongur í 10. flokki í Klaksvík. Í dag eru fimm vikur síðani seinasta epileptiskt-líknandi anfallið, - men sum kortini ikki var epilepsi**

SJÚKRASØGA
*Snorri Brend*
*norri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Klaksvík:** - Hetta var simpelthen bara so pínligt!

Mánadagurin 17. mars 2008 skuldi vera ein hugnaligur dagur fyri foreldrini, beiggjan, Joan og alla hina familjuna.

Alt var gjørt klárt til føðingardagin hjá yngra beiggjanum, og fólk sótu við borðið og prátaðu saman. Tað var sjálvandi Joan sum legði fyrst merki til tað: Hon varnaðist, at hon gjørdist eitt sindur sløv og føldi at hini gjørdust so kám og óskiljandi.

Meðan mamma hennara stendur við komfýrin og riggar til borðhaldið, fekk Joan eitt ógvusligt anfall, mitt meðan hon hugnar sær saman við hinum.

- Tá mamma vendi sær ímóti okkum, sá hon at eg var slongd í gólvið, mitt millum tveir stólar og hevði nógvar krampar.

- Hetta var ikki nøkur serliga góð uppliving til ein føðingardag, tí tú kanst ætla, at vit øll

*»Eg føldi tað akkurát sum um eg ikki fekk andað. Eg segði tað við babba, at luftrørið føldist so smalt at anda ígjøgnum«*

gjørdust sera kløkk, greiðir Joan frá.

Í døgunum frá 11. mars til 27. apríl hevði hon 21 anføll, ofta fleiri um dagin, so at foreldrini og onnur óttaðist fyri at hon hevði fingið herviligu sjúkuna epilepsi.

### Ein ordiligur lætti

Joan er ein fitt og vøkur genta í Klaksvík. Hon er virkin innan ítrótt, og spælir fótbólt við tí lokala felagnum. Men tað er kortini eitt sum hevur plágað hana heilt frá barnaskúlanum:

Framtenn hennara eru rættiliga tættar og lógu tá mestsum uppi á hvørji aðrari. Hóast hetta sjónliga tekinið um ein tannplágu, hevur hon ongatíð verið argað av skúlafelagum sínum.

Men tá hon gekk í 5. flokki varð avgerð tikin um at hon skuldi fáa ein sokallaðan leysan boyla. Henda brúkti hon tey næstu árini, fram til 9. flokk, mest um náttina, tí hon varð eitt sindur illa plágað av høvuðpínu, tá hon gekk við honum um dagin.

- Ein dagin segði eg: Stopp. Nú taki eg altso boylan av. Eg brúkti so ikki henda boylan í einar 2-3 mánaðir, og tað var bara super at sleppa av við hann. Ja, tað var ein ordiligur lætti, sigur Joan.

Hinvegin, so visti hon, at uttan ein slíkan leysan boyla, gjørdust framtenninar ikki beinar, og tí fekk hon ísettan ikki bert ein, men tríggjar fastar boylar í januar mánaði í ár.

Tað var eftir hetta, at trupulleikar hennara av álvara byrjaðu.



*- Eg hevði ikki færri enn tríggjar fastar boylar í munninum – ein í undirmunninum, ein í yvirmunninum og ein í gómanum. Nú havi eg ongan og føli meg betri, sigur unga klaksvíksgentan Joan*



*- Nú gleði eg meg til at svimjihøllin letur upp aftur, sigur Joan Finnsdóttir Danielsen*

### Fekk ikki luft

Bert ein mánað eftir, at hon fekk boylarnar settar í, merkti hon til fyrstu álvarsomu avleiðingarnar av hesum. Høvuðpína var ein avleiðing, men verri var við andadráttinum.

- Eg føldi tað akkurát sum um eg ikki fekk andað. Eg segði tað við babba, at luftrørið føldist so smalt at anda ígjøgnum, greiðir Joan frá.

Eingin visti, hvat orsøkin var til hetta ella hvat hetta var. Hon tók nakrar panodil fyri at linna pínuna, men hetta hjálpti einki.

Ein onnur fylgja av hesum var, at hon megnaði ikki at konsentrera seg um tað sum fór fram í skúlanum.

- Vit hugsaðu øll, at tað var epilepsi. Tað er í familjuni - omma mín hevur tað og eitt systkinabarn. Omma mín segði, at tað líktist tí hjá henni. Munurin var bert tann, at eg ikki var móð aftaná, greiðir Joan frá.

Men tann dagurin sum stendur greiðast í minni hennara man vera týsdagurin 11. mars. Henda dagin hevði Joan verið til páskaroynd í skúlanum.

### Einki samband

Eftir lokna roynd fór hon á gátt hjá sjeikinum, hóast hon bæði føldi seg móða, lina og illa fyri. Tá farið var um nátturðatíð, avgjørdi hon at fáa sær ein blund.

- Eg steinsovnaði, men løtu seinni byrjaði eg at fáa krampar. Roynt var at vekja meg, men tað var til onga nyttu. Einki samband fekst við meg, greiðir Joan álvarsom frá.

Tá hon umsíðir vaknaði, hevði hon sera ilt í høvdinum, men fór tó á føtur. Men møðin var kortini so stór, at hon fór aftur til songar. Løtu seinnu kom næsta anfallið.

- Eg hevði ikki ánilsi av, hvat tað kundi vera, men eg visti bara, at hetta var nakað sum eg ikki hevði havt áðrenn.

- Dagin eftir fekk eg eisini eitt anfall, og nú skilti eg at hetta var álvarsamt, sigur Joan.

### Mitt á vøllinum

Dagin eftir – hósdagin – fóru tey til lækna, og hann segði at hetta ljóðaði sum epilepsi. Hann sendi hana síðani til víðari kanningar hjá serlækna á Landssjúkrahúsinum.

Fýra dagar seinni kom næsta anfallið, - í roynd og veru sama dag sum beiggi hennara hevði føðingardag.

Joan er íðin ítróttakvinna og spælir við gentum 14-17 ár hjá KÍ. Ein dagin tær vandu, fekk hon eitt anfall mitt á vøllinum.

- Eg datt niður, men reisti meg uppaftur lítla løtu seinni og spældi víðari sum um einki var hent. Hini vistu av tí, so her var eingin panikkur!, sigur Joan.

Hetta ávirkaði eisini gerandisdag hennara heima. Tey tordu illa at lata hana ganga einsamalla oman ígjøgnum trappur. Tað var kanska ikki uttan orsøk at mamma hennara ein dagin tók soleiðis til: "Far í song við tær. Eg orki simpelthen ikki at hava teg uppi longur!"

### Ræðandi

Eftir herviligu upplivingina í føðingardegnum gingu tvær vikur til næsta anfallið.

Tá hevði hon verið til kanning og skanning, men einki var funnið. Joan var eisini givin at

*»Tá mamma vendi sær ímóti okkum, sá hon at eg var slongd í gólvið, mitt millum tveir stólar og hevði nógvar krampar«*

taka p-bollar fyri at útiloka alt, uttan at hetta hjálpti nakað.

Nú gingu aftur tvær vikur til næsta anfallið, men tá hetta hendi, kom rættiliga ferð á anføllini, um ein kann siga tað so. Joan hevur nevniliga skrivað niður, hvørja ferð hon hevur havt eitt anfall.

- Ja, eftir hetta anfallið sum var fríggjadagin 11. apríl klokkan 12:30, komu tey stormandi. Nú fekk eg brádliga fleiri anføll um dagin, so tú kanst ætla at hetta var sera